LM-099/2023

Fylgiskjal 9

Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 8 · Postboks 91 · FO-355 Vestmanna

Tlf. 770 100 · Fax 770 101
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Vestmanna, 19. februar 2024
J.nr.: 1002-1-2024
Viðgjørt: BáR/RI

Viðmerkingar frá Vestmanna kommunu til uppskotið um "Burðardygga ferðavinnu"

Vestmanna kommuna fegnast fyrst og fremst um, at eitt uppskot umsíðir verður lagt fram, sum hevur til endamáls at skipa ferðavinnuna og verja náttúruvirðini.

Viðmerkingar:

- Freistin at lata ferðavinnuætlanina inn, átti at verið longd til 1. juni 2026.
- Náttúrugjaldið átti í minsta lagi at verið tað dupulta, enn tað sum verður nevnt í viðmerkingunum til uppskotið, um tað skal røkka endamálinum.
- Tað er av alstórum týdningi, at náttúrugjaldið eisini fevnir um ferðafólk sum ferðast sjóvegis, tað verði seg fram við fuglabjørgunum ella øðrum náttúruperlum.
- Tað skal verða upp til hvørt einstakt kommunustýri at avgera, um ein nýggj nevnd verður skipað, ella ein verandi nevnd í kommununi kann umsita nýggja málsøkið.
- Landið skal ikki kunna áleggja kommununi at gera íløgur í nýggjar gøtur, um hettar er í stríð við ferðavinnuætlanina hjá kommununi, ella er ein figgjarlig avbjóðing.
- Kommunan hevur trupult við at halda gøturnar innangarðs við líka, vegna manglandi starvsfólkaorku – so um viðlíkahaldið skal viðkast til eisini at fevna um gøturnar uttangarðs, verður tað steinur omaná byrðu.

Vinarliga

Vestmanna Kommuna

Bjørg á Rógvi
borgarstjóri